FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Fíggjarnevndin
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

**Tórshavn**, 8. apríl 2019

**J.Nr.:** 19/00003-13
(at tilskila í svari)
**Tygara skriv:**

**Viðgjørt:** HKV

# Broytingaruppskot til tingmál 151/2018

Sum umrøtt á fundi í Fíggjarnevndini, tann 5. apríl 2019, vil Fíggjarmálaráðið mæla til, at Fíggjarnevndin leggur fram broytingaruppskot í tingmáli nr. 151/2018.

**Mælt verður til hesar broytingar:**

**1.** Frágreiðandi heiti verður orðað soleiðis:

(Ljóðbøkur gerast MVG-fríar)

**2.** Skjal 1 verður broytt sum ásett í skjali 1:

---

**Skjal 1**

Í skjali 1 verður strikað:

**Í Toll- og vøruskránni verður Gatt-tollurin (%) fyri hesi vørunummur orðaður soleiðis:**

| Vørunummar | Tollsatsur (%) | Tekstur |
|---|---|---|
| 87038010 | 0 | Nye |
| 87038090 | 0 | Brugte |
| 87039000 | 0 | Andre motorkøretøjer |

**Viðmerkingar til broytingarnar:**

Í broytingaruppskotinum verður mælt til at strika tann partin av uppskotinum, sum snýr seg um Gatt-toll á el-bilum, meðan tann parturin, sum hevur við ljóðbøkur at gera, verður varðveittur.

Ætlanin var at avtaka Gatt-tollin á el- og vetnisakførum – men tíðaravmarkað, eins og gjørt er við øllum øðrum avgjøldum á el- og vetnisakførum. Hetta er liður í, at skunda undir at røkka málinum um, at øll orka á landi í 2030 skal vera grøn. Tí hevur landsstýrið valt – fyribils- at strika øll gjøld á grønum akførum. Úrslitið er, at onki skrásetingargjald, ongin vegskattur og onki MVG í dag er á el- og vetnisakførum.

Hetta lækkar kostnaðin á einum el- og vetnisakfari munandi. T.d. kostar eitt el- ella vetnisakfar, sum vanliga hevði kostað 350.000 kr. við øllum gjøldum í dag umleið 188.000 kr., ella gott helvtina, tí skrásetingargjald og MVG ikki skulu rindast. Hartil verður ongin leypandi vegskattur rindaður í tíðarskeiðnum.

Hetta er gjørt, fyri at gera tað møguligt hjá flest møguligum at velja grøna loysn, framum dálkandi loysnir, tá akfør verða keypt.

Gatt-tollur á 8% verður lagdur á akfør, ið eru framleidd uttanfyri ES og uttanfyri tey lond, ið Føroyar hevur avtalur við. Til tess eisini at strika henda tollin í tíðaravmarkað skeið, varð hetta lógaruppskot lagt fram. Landsstýriskvinnan hevur eftirfylgjandi fingið upplýsingar um, at tað ikki er møguligt at avtaka Gatt-tollin í eitt avmarkað tíðarskeið. Tí verður mælt til at strika tann partin av uppskotinum, ið hevur við gatt-tollin á el-akførum at gera.

Orsøkin til, at talan er um tíðaravmarkað átøk er, at mett verður at tað er rætt leypandi at eftirmeta, hvørja ávirkan avgjaldsfrítøkan hevur, og tí mett verður, at økta framleiðslan og útboðið av el- og vetnisakførum fer at gera, at kostnaðarstøðið á hesum akførum fer at lækka og gerast líknandi tí á vanligum akførum, í nærmastu framtíð.

Parturin viðvíkjandi at gera ljóðbøkur mvg-fríar verður mælt til at seta í verk.

Fíggjarmálaráðið 8. apríl 2019.

**Kristina Háfoss**
Landsstýriskvinna